# …. Carola!





Børnini sluppu eisini á pallin









Tað var ikki tann nógvi tónleikurin á pallininum, men heldur sera fjølbroytta klaversplið hjá Pelle sum fylti salin, so tað rungaði í, og spældi hann nærum sum eitt heilt orkestur. Sum eitt eyka ískoyti til tað tónleistarliga fingu vit eisini nógv spæl av ísraelska manninum, sum Carola hevði boðið við til hesa konsertrøðina. Tey lærdu hvønn annan at kenna, tá hon fyrr hevur vitjað í Ísrael og nú ferðast hann so við og spælir hett forkunnuga streingjaljóðførið. Jú, tað gav eisini serstaka kenslu at hoyra henda tónleikin, sum hóskaði til kóringar, av teimum fýra, ið bakkaðu Carolu upp.

## Føroyskt íkast

Stutt frammundan konsertini kom ynski frá Pelle, ið skipaði tónleikin, um at fáa onkra føroyska luttøku. Skjótt var atborið og bæði kór og solistar luttóku. Myrna, sum eisini legði leiðina til Føroyar hetta vikuskiftið fekk samband við Vanju, sum skjótt fekk samband við royndar sangarar sum stillaðu upp eftir stuttum skotbrái, og væl má sigast verða komið burtúr. Tey sungu og fyltu væl upp, so tað var ein sonn frøi, sum altíð at hoyra.

Tá seinasti sangurin varð sungin, var týðuligt, at fjøldin vildi hava meira, og her fingu vit so sangin “När himlen kom till jorden” umaftur, og so sangin hjá Thore Ås: “Velsignelsen”.

## Samanumtikið

kann sigast, at eg fekk eina góða uppliving hetta kvøldið í Hoyvíkshøllini. Tveir tímar gingu skjótt, ja, nærum alt ov skjótt, men eg tori at siga, at øll fingu valuta fyri peningin. Heildin var góð, eins og sangurin, ljóðið og spælið samstemmaðu. Vit, sum sótu aftarlaga fingu eisini alt við.

Sum eg plagi at siga tað, so er tað altíð eina tonn verri at framføra tann andaliga sangin, tí hesin er ikki bara eitt undirhald, men ein heild sum skal og kann geva framførsluni eitt innihald, sum kann ávirka langa tíð frameftir. Boðskapurin er ikki til at fara skeivur av, og kemur hann altíð at liggja eftir, og tað trúgvi eg eisini, at ein kvinna sum Carola staðiliga ynskti skuldi vera úrslitið. Hon syngur fyri at bera út boðskapin um heimsins Frelsara, ið kom at frelsa tað, ið fortapt og forkastað var. Tað var tí Hann kom, sendur av Gudi sum loysigjald fyri okkum øll.

Nú er bara at líta frameftir og vænta, at tað verður kanska ikki alt ov leingi til Carola finnur vegin henda vegin aftur. Hon, eins og so mong onnur, kann fáa ta vælkendu Føroyasjúkuna, so hvør veit – vit hoyrast aftur.



Ein stúgvandi full Hoyvíkshøll